Børn í Burundi, sum tilvildarliga verða fongslað og pínd

16 ára gamla Odette Nzeyimana og 13 ára gamli Budari hava verið hildin aftur í Mpimba-fongslinum í Bujumbura í Burundi í yvir 8 mánaðar

Eins og fleiri av hinum børnunum, sum eru fongslað í Mpimpa, eru Odette og Budari skuldsett fyri at hava samstarvað við vápnaðu Hutu-andstøðurørsluna, sum royna at taka valdið yvir Burundi frá stjórnardeildunum, har meginpartin er av Tutsi-ættarbólkinum.

Í summum førum verða børnini handtikin eftir at vápnaðir andstøðulimir hava tvingað tey at hava vápn uppi á sær. Fleiri av børnunum vita als ikki av, at tey hava gjørt nakað brotsverk. Bert heilt fá av teimum, sum eru hildin aftur í Mpimba-fongslinum, hava verið fyri ein dómstól.


Bæði Odette og Budari eru blivin pínd í fongslinum. Odette varð tvingað at lata seg úr øllum klæðunum og síðan standa nakin frammanfyri fólki í trygdardeildunum í fleiri tímar.

Í juni í ár vóru minst 150 børn í fongslum í Burundi. Hetta eru fongsul, sum ofta eru á tremur við fangum og har viðurskiftini ofta eru skitfør og heilsuskaðilig. Nógv børn verða hildin aftur í sama rúmi sum vaksnir fangar og hetta økir um vandan fyri at børnini verða misnýtt.

Soleiðis kannst tú hjálpa børnunum í Burundi:

Skriva eitt bræv til stjórnina í Burundi, har tú heitir á hana um at halda barnarættindini. Niðanfyri er orðað eitt bræv á enskum, sum tú kanst senda burundisku stjórnini.Send brævið við telefaksi til:

Terence Sinunguruza, Ministre de la Justice, fax.nr. (00257) 222148
og Eugéne Nindorera, Ministre des Droits de la Personne Humaine, fax. nr. (00257) 217549



Dear Minister

I am writing to express my concern at hearing of over 150 children detained in Burundi prisons, many of whom are accused of collaboration with armed opposition groups. Most are kept in harsh conditions and are not being held separately from adult inmates, putting them at increased risk of abuse and violence.

Im particualry concerned to receive reports that many of these children have been ill-treated or tortured while in detention. In particular I would urge Youto investigate the cases of 16-year old Odette Nzeyimana, detained in Mpimba, who was reportedly tortured by agents of the brigade spéciale de recherche, and 13 yearold Budari, who was beaten at the gendarmerie in ljenda.

I respectfully ask that You uphold Burundi´s obligations under the UN Convention on the Rights of the Child and put an immediate end to the arbitrary detention and torture of children.

Yours faithfully

Á føroyskum er innihaldið í brævinum hetta:

Kæri ráðharri

Eg skrivi fyri at siga, hvussu ørkymlað/ur eg eri av at hoyra, at yvir 150 børn verða hildin aftur í fongslum í Burundi. Nógv av teimum eru skuldsett fyri at samstarva við vápnaðar andstøðubólkar. Tey flestu av hesum børnunum verða hildin undir hørðum umstøðum. Vaksnir fangar og børn verða ikki hildin hvør sær og hetta setir børnini í størri vanda fyri misnýtslu og harðskapi.


Serliga ørkymlar tað meg at frætta, at fleiri av hesum børnunum eru illa viðfarin ella pínd í fongslinum. Serliga heiti eg á tygum um at kanna málini viðvíkjandi teirri 16 ára gomlu Odette Nzeyimana, sum verður hildin aftur í Mpimba og sum er blivin pínd av umboðum fyri *brigade spéciale de recherche* og tí 13 ára gamla Budari, sum er blivin sligin av *gendarmerie in ljenda*.

Virðingarmest heiti eg á tygum um at halda skyldurnar hjá Burundi undir Barnarættindasáttmálanum hjá ST og alt fyri eitt at steðga tilvildarligu fongslingini og píningini av børnum.

Vinarliga (skriva navn og bústað)

nøvn nú


Heilsanir



Góða Rannvá
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum 17. nov.
Ynskja mamma, pabba og Sofia



Helgi Súnason Nielsen
Góði fitti Helgi, hjartaliga tillukku við tínum fyrsta føðingardegi.
Ynskja Leif og Jónas




Helgi Súnason Nielsen
Góða elskaði Helgi, hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum 18. nov.
Ynskja mamma og babba

Sólirnar hava fingið
NÝGGJ RØR
Kostnaður:
1 ferð 25 kr.
10 ferðir 200 kr.
Opið er allar dagar frá kl. 8 til 23.
Sólirnar hjá Jórun
Liknargøta 8
Tlf. 447875



Góði babba
Hjartaliga tillukku við degnum 18. nov. Vit takka fyri at tú er so góður við okkum.
Ynskja Linda og Jógvan-Emil
P.S. eisini ein heilsan til gummu 9. nov. og ommudidd 24. nov.



Helgi Súnason Nielsen
Góði Helgi, hjartaliga tillukku 1 ára degnum 18. nov. Muss og klemm.
Ynskja omma, abbi og Høgni Gubbi

nøvn nú 5 ferðir um vikuna 25,- kr.

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Friggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:

.....

.....

.....

.....

.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**NØVN NÚ**«